# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# HB endar á Streymnesi

**Endaliga skráin fyri Formula-kappingina er nú løgd. B36 og ÍF fara ígongd leygardagin 29. mars, og dagin eftir spæla hini átta liðini. Seinasta umfar er á skránni 25. oktober**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

29. mars rullar Formulabólturin fyri fyrstu ferð í ár. Tá leggur B36 graslíki til uppgerð móti uppflytarunum úr Fuglafirði, og so verður annars spælt við fullari ferð fram til 13. juli, tá liðini fara í stuttan summarsteðg.

6. august er landskapping aftur á skránni, og við undantakið av onkrum landsdystarvikuskiftum verður so spælt hvørt vikuskiftið fram til 25. oktober, sum er seinasti leikdagur.

Umframt B36 og ÍF eru hinir dystirnir í fyrsta umfarinum GÍ-B68, NSÍ-B71, EB/S-KÍ og HB-Skála.

## Góðbitar bíða

Og líkt er til, at FSF hevur tikið nakað av atliti til, hvussu ymsu liðini stóðu seg í fjør. Og hvørji kunnu roknast við at spæla avgerandi dystirnar móti kappingarenda. Í øllum førum eru hópin av innanhýsis uppgerðum millum tey fremstu í fjør, tá seinastu umførini av landskappingini skulu spælast.

Meistararnir úr NSÍ skulu seinastu fimm umførini spæla móti B36 (h), EB/Streymi (h), HB (ú), KÍ (ú) og Skála (h). Silvurvinnararnir úr EB/Streymi hitta tá GÍ (h), NSÍ (ú), B36 (h), Skála (ú) og HB (h). B36 vann í fjør bronsu, og teir enda við NSÍ (ú), B71 (h), EB/S (ú), HB (ú) og B68 (h). Og HB, sum í fjør gjørdist nummar fýra hevur ÍF (h), GÍ (ú), NSÍ (h), B36 (h) og EB/S (ú).



*EB/Streymur og HB verða av fleiri mett sum tveir av mest seriøsu FM-biðlunum. Og tí kann hugast, at dysturin við Margáir í seinasta umfarinum kann tí væl gerast avgerandi fyri, at hvar FM-heitið endar í 2008. Men fyrst skulu liðini bæði so spæla 26 aðrar dystir*

# Bara 4 av 16 venjarum vóru úr heimlandinum

**12 av teimum 16 londunum, sum luttóku í Africa Cup of Nations høvdu ein venjara úr einum øðrum heimsparti**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*hersim@sosialurin.fo*

Yvirlitið talar fyri seg: Fimm fraklendingar, fýra týskarar, ein hollendingur, ein póllendingur og ein brasiliumaður. Bert Sudan, Angola, Egyptaland og Zambia høvdu venjarar úr sínum egna landi. Hinir 12 luttakarnir høvdu útlendskar venjarar. Í so máta var sigurin hjá Egyptalandi óivað søtur hjá mongum afrikanum. Hátturin summir av teimum hvítu venjarunum føra seg fram uppá, verður ikki mettur at vera tann besti. Sunnanfyri Sahara eru tað bara Angola og Zambia, sum ikki hava ein venjara frá einum øðrum heimsparti.



*Týski Otto Pfister hevur vant ikki færri enn átta afrikonsk lond. Her sæst hann leiðbeina Mohamadou Idrissou undir finaluni hjá Cameroun móti Egyptalandi*

*Mynd: Polfoto/AP*

## Vant 8 afrikonsk lond

Ein hin kendasti venjarin í Afrika er týskarin, Otto Pfister. Pfister hevur umframt Kamerun, sum hann venur nú, vant Rwanda, Burkina Faso, Zaire (nú Demokratiska lýðveldið Kongo), Senegal, Fílabeinsstrondina, Ghana og Togo. Nógvir av landsliðsvenjarunum brúka leistin hjá Allan Simonsen og Henrik Larsen. Teir eru mest heima við hús í Evropa, og fáa lisið oman yvir seg, at teir ikki hyggja nevnivert eftir dystum í teimum afrikonsku landskappingunum. Tá Pfister bleiv settur sum venjari hjá Kamerun savnaði hann 30 leikarar til eina venjingarlegu, og út frá henni valdi hann hópin út, sum hann stórt sæð hevur hildið fæst við. Tað loysir seg ikki at gera ein góðan figur í kamerunski liguni. Tí Pfister er ongantíð til ein ligu-dyst í Kamerun. Pfister hevur hildið fast við Rigobert Song, sum øll fjølmiðlafólk í Kamerun hava ynskt av landsliðnum. Sami Song gjørdi brølarin, sum førdi til sigursmálið hjá Egyptalandi í finaluni. Pfister vandi Ghana millum 1989 og 1995. Hann lovaði at føra landið til HM, men tað miseydnaðist - væl og virðiliga.

## Eisini Le Roy

Venjarin hjá vertslandinum Ghana, franski Claude Le Roy, hevur eisini fingið toyggið, hóast Ghana vann bronsu. Ghanesiskir fjølmiðlar hava eisini funnist nógv at Le Roy, men eins og Otto Pfister tekur Le Roy sær ikki av atfinningunum. Mótargumentið hjá fleiri av fótbóltssambondunum í afrikonsku londunum er, at tað er best at hava ein evropiskan venjara, sum ikki skramblar saman av atfinningunum í fjølmiðlunum. Ein heimligur venjari hevði lurtað ov nógv eftir fjølmiðlunum. Eisini bera nógvir afrikanskir fótbóltsleiðarar ótta fyri, at ein heimligur landsliðsvenjari hevði valt nógvar leikarar út frá sínum yndisfelagi í teirri heimligu liguni.

## Droppaður

Í 2005 hendi eitt fótbóltsundur í lítla afrikanska landinum, Togo. Landið spældi seg til HM-endaumfarið í Týsklandi. Venjari var tann nigerianski Stephen Keshi. Men í februar 2006 kom fjáltur á togolesiska fótbóltssambandið. Teir tordu ikki at lata ein afrikana hava høvuðsábyrgdina av liðnum til HM-endaspælið. Togo skifti Stephen Keshi út við Otto Pfister, men tað gjørdi einki gagn. Togo fekk ikki eitt einasta stig í HM-endaspælinum, sum var hildið í heimlandinum hjá Otto Pfister. Men tað forðaði kortini ikki fótbóltssambandinum hjá Kamerun at seta sama mann í starv sum landsliðsvenjara hjá Kamerun. 70 ára gamli Pfister nær óivið at venja nøkur afrikonsk lond aftrat.

## FAKTA

**Venjararnir**

| | | |
|---|---|---|
| Nigeria: | Berti Vogts | Týskland |
| Fílabeinsstrondin: | Uli Stielike | Týskland |
| Benin: | Reinhard Fabisch | Týskland |
| Mali: | Jean-Francois Jodar | Frakland |
| Ghana: | Claude Le Roy | Frakland |
| Guinea: | Robert Nouzaret | Frakland |
| Namibia: | Arie Schans | Niðurlond |
| Marokko: | Henri Michel | Frakland |
| Egyptaland: | Hassan Shehet | Egyptaland |
| Zambia: | Patrick Phiri | Zambia |
| Kamerun: | Otto Pfister | Týskland |
| Sudan: | Muhammed Abdallah | Sudan |
| Senegal: | Hernry Kasperczak | Pólland |
| Tunis: | Roger Lemerre | Frakland |
| Angola: | Luis Oliveira Goncalve | Angola |
| SuðurAfrika: | Carlos Alberto Parreira | Brasilia |